# Tryggarumegin á netinum

## Hvat sigur lógin?

Mariann Reinert
Føroya Politi



# Samtykki – hvat er tað?

Samtykki er at geva loyvi til

Tað krevst altíð samtykki til at deila nakinmyndir ella filmsbrot av vaksnum persóni, sum er 18 ár ella eldri – tað merkir, at persónurin sigur ja av egnum fríum vilja

Tað er altíð ólógligt at deila nakinmyndir ella filmsbrot av persóni undir 18 ár, við ella uttan samtykki

FØROYA TELE // SSP Skúli Sosialir mynduleikar Politi nema

# § 264a í revsilógini

Tann, sum av órøttum avmyndar persónar, sum eru á einum staði, har ikki er frítt at koma, verður revsaður við sekt ella fongsli í upp til 6 mánaðir. Sama við honum, sum við kikara ella øðrum tóli av órøttum eygleiðir slíkar persónar.

# Viðmerkingar til § 264a

Dømi:

Viðhaldsfólk til fótbóltsdyst – ikki brot á § 264a

Persónur í skiftirúmi – brot á § 264a

Verður samtykki givið, er í lagi at taka myndina

# § 264d i revsilógini

Við sekt ella fongsli í upp til 6 mánaðir verður tann revsaður, sum av órøttum víðarigevur boð ella myndir, ið viðvíkja persónligum viðurskiftum hjá øðrum persóni ella aðramáta vísa hann í umstøðum, sum skilliga kunnu krevjast ikki at fyrikoma almenningin. Ásetingin er eisini galdandi fyri boð ella myndir, ið viðvíkja deyðum persóni.

# Viðmerkingar til § 264d

Dømi:

Mynd, sum tú lógliga hevur tikið, men ikki sømir seg at leggja út á internetið – eitt nú nakinmynd av fyrrverandi unnustu/unnusta (18+), er brot á § 264 d

Ein sokallað hatisíða kann vera brot á § 264d

Ein skaddur í einum ferðsluóhappi er brot á § 264d

Mynd av persóni á Vaglinum á ólavsøku er ikki brot á § 264d

# §236 í revsilógini

Tann, sum breiðir út pornografiskar myndir, filmar ella aðrar pornografiskar, visuellar endurgevingar ella tílíkt av persónum undir 18 ár, verður revsaður við sekt ella fongsli í upp til 2 ár ella undir serliga skerpandi umstøðum við fongsli í upp til 6 ár.

FØROYATELE SSP Skúli Sosialir mynduleikar Politi nema

# Viðmerkingar til §236

Dømi:

At taka, deila ella hava nakinmynd í varðveitslu av persóni undir 18, er brot á §236, óansæð um persónurin hevur givið samtykki ella ei

Eitt par, har báðir persónar eru 15 ár ella eldri, kunnu deila nakinmynd sínámillum, um bæði hava givið samtykki. Myndin má ikki deilast ella vísast øðrum og skal slettast, um parlagið heldur uppat

FØROYATELE SSP Skúli Sosialir mynduleikar Politi nema

# Um tú sendir eina nakinmynd av tær

Tað er brot á lógina, um ein persónur sendir eina nakinmynd ella filmsbrot av sær sjálvum, uttan at móttakarin hevur biðið um tað og móttakarin kennir seg stoyttan av myndini ella filmsbrotinum

Brot á hetta kann revsast við fongsli í upp til 2 ár

FØROYATELE SSP Skúli Sosialir mynduleikar Politi nema

Hvat gert tú, um onkur sendir tær eina pornografiska mynd ella filmsbrot av persóni undir 18 ár, sum tú ikki hevur biðið um?

Svar: sletta!

Tað er ikki ólógligt at móttaka myndina. Tað er ólógligt at hava myndina á tíni eind og ólógligt at deila myndina

FØROYATELE SSP Skúli Sosialir mynduleikar Politi nema

Hvat gert tú, um tú hevur givið samtykki og angrar tað?

Tú kanst taka samtykki aftur

Hugsa teg væl um

Ver ein góður vinur

Sig frá!

FØROYATELE

SSP Skúli Sosialir mynduleikar Politi

nema